# TÍÐINDI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
post@sosialurin.fo
tlf 341800

*- Nú á døgum er tað ógvuliga lætt at avlurta fartelefonir og telefonir til fastnet, eitt nú tráðleysar telefonir fyri at hava eftirlit, hvønn kvinnan tosar við og um, hvat.Tað nýggjasta er eisini at bróta seg inn á telduna hjá konuna fyri at lesa alt samskifti, hin hevur við onnur.*
Elin Reinert Planck, Kvinnuhúsið

# Vil fáa loyvi at hava fólkaatkvøðu um at leggja kommunur saman

**Landsstýrismaðurin í innlendismálum fer skjótt at leggja uppskot fyri Løgtingið um sjálvbodna kommunusamanlegging**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jacob Vestergaard vil nú hava heimild at skipa fyri fólkaatkvøðu í teimum ymsu kommununum fyri at spyrja fólkið hvat tey halda um kommunusamanlegging*

Hereftir skulu kommunur, sum ætla at leggja saman, fylgja nøkrum greiðum reglum

Landsstýrismaðurin í innlendismálum fer skjótt at leggja uppskot fyri Løgtingið um sjálvbodna kommunusamanlegging.

Eftir hesum skulu Føroyar býtast sundur í sjey øki.

Tað merkir, at tær kommunur, sum ætla at leggja saman, ella skulu samstarva, skulu gera tað innanfyri eitt ávíst øki.

Tá ið tosað verður um samstarv, verður í hesum sambandi hugsað um lógarásett samstarv, sum skal vera ímillum kommunurnar.

Hvat kommunurnar annars finna út av øðrum samstarvi, er annað mál.

Men tað merkir samstundis, at ætlanin er ikki at tvinga kommunur at leggja saman, men tá ið kommunur sjálvbodnar leggja saman, kunnu tær bara leggja saman við kommunur í sínum ávísa øki.

Í hesum sambandi verður Suðuroy eitt øki, Sandoy eitt øki, Vágoy eitt øki, Sundalagið eitt øki, Norðoyggjar eitt økið fyri at nevna nøkur dømi.

Men eftir lógini, sum sum nú verður løgd fyri Løgtingið, fer Jacob Vestergaard eisini at fáa heimild til at skipa fyri fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging í teimum ymsu økjunum.

Tað merkir, at landsstýrismaðurin kann skipa fyri fólkaatkvøðu fyri at spyrja fólkið í teimum ymsu kommununum í einum øki, um tey vilja hava, at kommunurnar leggja saman.

- Men í hvønn mun, Jacob Vestergaard fer at brúka eina slíka heimild, veit

## Førarar til Tamrock 700 Borivogn v/húsi

Søkt verður eftir royndum førara til veg- og lendisarbeiði.

Áhugaðir kunnu venda sær til skrivstovu okkara ella til Jón Danielsen á tel. 210 683

Sosialurin 341800

ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705

## Blandimeistari

Til betongblandistøð okkara í Havn søkja vit eftir einum blandimeistara at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Í samstarvi við leiðaran á blandistøðini, umfatar starvið í høvuðsheitinum:

- *at taka ímóti bíleggingum og skipa fyri blanding.*
- *at skipa og leggja útkoyringina av betongi tilrættis.*
- *at luttaka í viðlíkahaldi av støð og útgerð.*

**Útbúgving og førleikar v.m.**
Vit leggja dent á, at tú er álítandi, røkin og ágrýtin. Teknisk og/ella handverksútbúgving er ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

**Løn**
Lønin verður ásett sambært avtalu.

Meiri fæst at vita um starvið við at ringja á skrivstovuna
á tel. 350700 ella til Jón Danielsen á tel. 210683.

Umsóknir skulu verða felagnum í hendi seinast fríggjadagin 5.mai 2006.

Sosialurin 341800

ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705

STARVSLÝSING

## Handverkari

**Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi handverkara til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja skjótast gjørligt. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum entreprenørmaskinsmiður, maskinsmiður, bilsmiður, lastbilasmiður ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum Føroya Handverkarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn.

Merkið brævbjálvan „Umsókn handverkari“. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella Jóhan Hansen, smiðjumeistara, á tlf. 540 951.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
byggir land